# Funkur í RVG – Rætta rokningar – RVG-umsitari (lokal admin)

Í hesum partinum verður greitt frá, hvussu til ber at rætta uppgávur. T.d. rætta skeivar upphæddir og rætta kredtinotur, ið eru skrásettar sum rokningar.

**Dømi 1** Rætta upphædd í uppgávu.

1. Rokning frá Tjaldurs Apotek á **379,27** kr. er skrásett í RVG við upphædd á **356,66** kr. Munur á upphædd á rokning og í RVG 22,61 kr.



2. Trýst á **Senda at rætta**




3. Viðmerking verður skrivað um viðkomandi broytingar, og síðani trýst á **Játta og goym** fyri at senda uppgávuna til rættingar.




4. Eitt teldubræv verður sent til viðkomandi, ið hevur móttikið rokningina at rætta.

- Um ein rokning hevur støðuna **Góðkenn**, verður rokningin send til tann brúkaran á stovninum, ið hevur rættindi at rætta uppgávur, t.e. viðkomandi er skrásett/-ur sum **RVG-umsitari** (lokal admin)
- NB! Um ein stovnur hevur fleiri brúkarar, ið hava rættindi at rætta uppgávur, verður uppgávan send til tann, ið stendur fyrst í stavraðnum eftir fornavninum. T.e. um 3 brúkarar hava rættindi at rætta á sama stovni, ið eita Ann, Anna og Jógvan, so verður rokningin send til Ann.
- Um Anna og Jógvan skulu hava uppgávuna, t.e. rokningina/kreditnotuna, so er neyðugt at flyta hesar. Sí vegleiðingina **Flyta rokningar** her.



5. Uppgávan hevur fingið støðuna **Rætta**, og til ber nú at broyta upphædd.




6. Tá upphæddin er rættað, í hesum døminum til 379,27 og verður skrásett útfyri **Frávik** -22,61.



7. Næsta stig er at senda rokningina aftur til at góðkenna. Til ber ikki at rætta frávikið á konteringslinjunum meðan rokning hevur støðuna **Rætta**. Til ber at rætta í upphæddirnar í konteringslinjunum tá rokningin hevur støðuna **Góðkenn** aftur.



8. Tá trýst er á **Send at góðkenna** verður uppgávan send til viðkomandi, ið hevði uppgávuna at góðkenna og sendi uppgávuna at rættingar.



9. Frávikið á -22,61 kr. er lagt afturat uppruna vøruupphæddini ( 285,33 + 22,61 ) = 307,94 kr., so nú rættingin framd, frávikið er 0,00 og trýst á **Goym**.

